# Valkortini eru á veg



*Valkortini lætta munandi um á valstøðunum, tá fólk koma at velja*
*Tilvildarliga mynd*

**Av tí at valið er leygardag í ár er skotbráið so stutt, og tí verða valkortini eisini veljarunum seint í hondum**

**VAL 08**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólk hava undrað seg um, at valkortini ikki enn eru komin fram. Men tað hevur kortini sína einføldu orsøk.

- Sambært lógini kunnu fólk flyta kommunu fram til eina viku undan valinum, og framvegis verða skrásett í nýggju kommununi. Av tí sama ber ikki til at skriva út vallistarnar fyri enn í fyrsta lagi eina viku framman undan valinum, sigur Hilmar Høgenni frá Innlendismálaráðnum, sum stendur fyri avgreiðsluni av valkortum hesaferð.

Vanliga er tað Landsfólkayvirlitið, sum tekur sær av at senda valkort út, men hetta krevur nógv eyka arbeiði, verður sagt av Landsfólkayvirlitinum, og tá valið so eisini er leygardag, »missa« tey tveir dagar. Og tað er orsøkin til, at Innlendismálaráðið stendur fyri at fáa valkortini út hesaferð.

- Valkortini eru á veg, og Postverkið hevur garanterað okkum, at valkortini eru øllum veljarum í hendi í seinasta lagi hósdagin, sigur Hilmar Høgenni í Innlendismálaráðnum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Um kvøldið frískar hann vindin av suðri. Hitin millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi, men onkur sólglotti. Hitin millum 2 og 6 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -18 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -4 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 13 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | -5 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 7 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 973 hPa. eystan fyri Føroyar fer norðureftir.




**Í dag:**
Ein veikur hátrýstryggur yvir Føroyum fer í landnyrðing. Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið kemur hendavegin og verður væntandi við Føroyar hósdagin

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/01 kl. 06[00] – 14/01. 06[00]. Hitin í gjár: 3°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 10/01 kl. 06[00] – 11/01. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 44 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

3. jan. Mánin longst frá jørðini
8. jan. Tendring
19. jan. Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. jan. | 11.40 | - | 10.40 | 23.16 | 10.55 | 23.31 | 01.04 | 13.40 | 02.04 | 14.40 | 09.55 | 22.31 | 08.55 | 21.31 | 11.55 | - | 00.19 | 12.55 | 11.25 | - | 00.04 | 12.40 |
| 16. jan. | 00.16 | 12.53 | 11.53 | - | - | 12.08 | 02.16 | 14.53 | 03.16 | 15.53 | 11.08 | 23.46 | 10.08 | 22.46 | 00.31 | 13.08 | 01.31 | 14.08 | 00.01 | 12.38 | 01.16 | 13.53 |
| 17. jan. | 01.31 | 13.56 | 00.31 | 12.56 | 00.46 | 13.11 | 03.31 | 15.56 | 04.31 | 16.56 | - | 12.11 | 11.11 | 23.37 | 01.46 | 14.11 | 02.46 | 15.11 | 01.16 | 13.41 | 02.31 | 14.56 |
| 18. jan. | 02.22 | 14.50 | 01.22 | 13.50 | 01.37 | 14.05 | 04.22 | 16.50 | 05.22 | 17.50 | 00.37 | 13.05 | - | 12.05 | 02.37 | 15.05 | 03.37 | 16.05 | 02.07 | 14.35 | 03.22 | 15.50 |
| 19. jan. | 03.18 | 15.47 | 02.18 | 14.47 | 02.33 | 15.02 | 05.18 | 17.47 | 06.18 | 18.47 | 01.33 | 14.02 | 00.33 | 13.02 | 03.33 | 16.02 | 04.33 | 17.02 | 03.03 | 15.32 | 04.18 | 16.47 |





